

**Óli Jacobsen**
*olijacobsen@post.olivant.fo*

# Hondin sum broytti kósina

**Ein av teimum eg hitti í Newcastle var Dion Vestergaard, ættaður úr Vági men búsitandi í Danmark. Hann sigldi eisini undir krígnum og hann verður roknaður fyri at vera ein tann yngsti krígssiglarin á lívi. Pápi hansara Dánjal Johan Vestergaard sigldi eisini undir krígnum, og Dion greiddi frá eini heilt serligari hending, sum pápanum kom fyri:**



*Johanna Kristina og Dánjal Johan Vestergaard. Hann broytti kós eftir hond, hann sá í dreymi og bjargaði neyðstaddari manning*



*Tað var Ebba Müller, sum átti »Misletoe«, tiskil er hetta eisini partur av Müllersøguni*

Pappa var skipari á »Vilhelminu«. Hann sigldi undir øllum krígnum millum Ísland, Ongland og Føroyar við fiski. Ein túrin, teir fóru avstað til Ísland at keypa fisk, og hann lá í koyggjuni, var hann úti fyri eini serligari hending. Hetta var 8. juli 1943. Hann segði seinni, at hann visti ikki, um hann svav ella var hálvvakin. Men hann sá eina hond koma í sjókortið, og hondin peikaði á eina positión á kortinum, sum veik 90 stig frá teirri kós, sum skipið sigldi. Hann tørnaði út og broytir kós 90 stig, soleiðis sum hondin hevði víst. Manningin undraðist og var rædd, og teir hildu skiparan vera frá sær sjálvum og høvdu hug til at taka ræðið av honum. Men hann setti allar menninar at hava útkikk, ein var uppi í mastrina.

Teir sigldu um 4 tímar. So sigur hann eina ferðina: »Síggja tit nakað?« »Nei«, siga teir. So sigur hann samstundis, sum hann peikar: »Hyggið har í horisontinum, er nakað har«. »Ja«, siga teir, »har er okkurt«. Teir sigldu so eftir tí, og so vísti tað seg, at tað var »Misletoe«, sum eisini var á veg til Íslands. Hon var bumbað og sundurskotin við maskinbyrsu av týskum flogfari. Teir komu til »Misletoe«, og teir settu stórbátin út. Bestimaðurin fór við bátinum yvir til teirra. Manningin á »Misletoe« var komin í teirra stórbát. Men hann lak sum sáldið. Hann var raktur av maskinbyrsuskotunum hjá flogfarinum.

## Kendi hondina aftur

So teir tóku bátin umborð á »Vilhelminu«, og teir vóru eisini umborð á »Misletoe« og tóku okkurt upp har sum t.d. medisinkistina. Teir komu so aftur at »Vilhelminu« við manningini á »Misletoe«. Men ein maður var deyður, tá teir komu at borðið. Teir høvdu lagt eina presenning yvir tann deyða mannin. Og tá kendi pappa hondina aftur á tí deyða manninum, sum hana, hann hevði sæð í kortinum.

Tann deyði maðurin visti, at hann fór at doyggja eftir at hann var raktur, tá hann stóð í stýrihúsinum. Hann hevði biðið til Várharra fyri mannskapinum og fyri síni familju heima á Glyvrum. Hetta var tann 42 ára gamli Martin Jacobsen av Glyvrum. Eftir sat einkja við 13 børnum, sjey teirra vóru ikki undankomin.

Ein annar maður varð eisini raktur og doyði á veg inn eftir hjálp. Tað var tann 24 ára gamli Hilmar Egholm úr Hvalvík.

## »Teir koma aftur í dag«

Dánjal Johan Vestergaard var ættaður úr Sumba og búsitandi í Vági. Sum sagt sigldi hann alt kríggið. Hann fór við »Vilhelminu« í 1941 og sigldi við henni til 1947. Men hendan søgan er eitt prógv um, at tað er meira millum himmal og jørð, enn vit halda.

Tað er ein onnur frásøgn um tað sama í samband við Dánjal Johan. Eina ferð var so long tíð farin, at teir einki høvdu frætt frá »Vilhelminu«, at kona hansara Johanna Kristina, sum var ættað úr Porkeri, ikki ivaðist í, at teir vóru farnir med alla. Men so ein dagin hittir hon Niclas í Skorti, og hann sigur við hana: »Teir fara at koma aftur í dag. Eg havi í nátt droymt Eli Lassen, sum var við, og har stóð væl til.« Hetta var ringt at trúgva, men hvussu var og ikki, teir komu aftur sama dag.

**Í komandi Miðviku**
verður frásøgn hjá Gunnvør Norðfoss, sum giftist við bretskum hermanni og búsettist í Fleetwood

# Ein av lagnunum

Í 1956 varð reistur ein minnisvarði yvir teir, sum fórust á sjónum bardagaárini. Her eru eisini sett nøvnini á teimum farnu. Tey eru 210.

Men í sínum bókaverki um bardagaárini nevnir Niels J. Arge níggju nøvn afturat. Hetta eru alt menn, sum hava siglt við útlendskum, serliga donskum, skipum. Tískil er samlaða talið 219, sum er eitt ófatiligt tal í mun til okkara fólkatal.

Ein av hesum níggju, sum kom afturat upprunalistanum, var tann 24 ára gamli Joen Jacob Elias Jacobsen úr Sandvík. Hann umkomst 15. februar 1940 við 5.000 t. stóra danska skipinum »Maryland« hjá DFDS, sum var á veg heim við oljukøkufarmi úr Suðuramerika. Somu lagnu fekk 19 ára gamli Arthur Hentze av Tvøroyri við sama skipi.

Teir settu inn á Madeira eftir koli til heimferðina og fóru hagani 7. februar 1940 við kós móti Danmark.

Leiðin varð løgd vestan fyri Írland, og ætlanin var at fara inn til Kirkwall í Orknoyggjunum til kontrabandakanning hjá bretsku myndugleikunum. Skipið hevði samband við Lyngby Radio 10. februar. Men teir komu ongantíð til Kirkwall. Tað einasta sum frættist frá teimum var, at ein brotin bjargingarbátur rak á land á oynni North Uist á vesturstrond Onglands nøkur ár seinni.

Familjan í Føroyum frætti, at teir báðir vóru saknaðir, og hetta frættu tey fyrst frá føroyingi í Danmark, sum tey kendu, og tey hava helst eisini frætt frá reiðarínum, áðrenn sambandið millum londini varð kvett í apríl 1940. Hetta var ein sera stórur hvøkkur at fáa hjá teimum heima. Men tað var ikki fyrr enn langt eftir kríggið, at tey fingu neyvt at vita, hvat var hent. Tá var staðfest, at teir vórðu skotnir niður av týskum kavbáti vestanfyri Skotland. Hetta hendi, áðrenn Danmark gjørdist partur av heimsbardaganum. Tað forðaði ikki týskarum at leggja á uttanveltað donsk skip. Og »Maryland« var ikki nakað eindømi. Tað vóru onnur donsk skip, sum fingu somu lagnu.

Hetta hendi 15. februar 1940, og var hetta sjálvur 25 ára dagurin fyri skaðagrindina í Sandvík í 1915, tá tveir mammubeiggjar doyðu saman við 12 øðrum monnum úr Sandvík og Hvalba. Jóan Jákup Elias var uppkallaður eftir teimum báðum, Jóan Jákup og Elias.

Jóan Jákup Elias var føddur í 1916 og tók setiskiparaprógv í Havn í 1936. Í 1938 fór hann til Keypmannahavnar at fáa sær kjans sum matrósur í uttanlandasigling.

Jákup Elias, sum hann var kallaður, var sonur Marin Kristinu og Dánjal á Hólum. 90 ára gamla Samalena Jacobsen í Sandvík er einasta av systkjunum, sum er eftir á lívi. Hon minnist Jacob Elias sum ein evnagóðan, skikkiligan og dámligan ungan drong, sum eins og mangir aðrir ungir føroyingar hevur havt útlongsul. Hann hevur helst vilja siglt við farmaskipi fyri at fáa siglingstíð, so hann kundi fara víðari á navigatørskúla og harvið gerast yvirmaður. Hetta hevði hann fortreytir fyri, tí hann hevði góð evni. Men lagnan gjørdist ein heilt onnur.



*Joen Jacob Elias Jacobsen úr Sandvík var ein av teimum mongu føroyingunum, sum leitaðu sær eydnuna við útlendskum skipum. Men ikki gekk eftir vild*